# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Kawasaki GTR 1400 ABS

**Kawasaki koma nú á marknaðin við eini heilt nýggjari motorsúkklu. Talan er um GTR 1400 ABS , sum er ein sonevnd »Touring« við allari útgerð sum t.d. ABS-bremsum, innbygdum dekktrýstmátara og keyless startskipan**

MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Japanska Kawasaki verksmiðjan hevur eitt stórt program við nógvum ymiskum motorsúkklum. Ein av nýggjheitum frá Kawasaki er GTR 1400, sum er ein sonevnd »Touring« við allari útgerð sum t.d. ABS-bremsum, innbygdum dekktrýstmátara og keyless startskipan.

Málsetningurin við Kawasaki GTR 1400 er at gera eina tekniskt framkomna motorsúkklu við trygdini í hásæti, tí fæst hon m.a. við ABS-bremsum.

Fyrimunurin við ABS-systeminum er, at bremsurnar ikki læsast (blokera) undir eini niður bremsing, soleiðis at eingin trupulleiki er at koyra uttan um óvæntaðar forðingar á koyribreytini.

Súkklan tekur seg væl út og er góð at sita á og at koyra. GTR 1400 er ein sonevnd Touring súkkla, sum er gjørd til at koyra langt við. Súkklan er sera kvik og koyriegineikarnir eru heilt í topp, eisini við ferð í svingum. Instrumentini eru løtt at avlesa undir koyring.

Motorurin er ein 4 syl. 1.352 ccm og 155 hk við 8.800 snún/min. Súkklan koyrir frá 0-100 km/t upp á 2,7 sek og toppferðin er 290 km/t. Girskiftið og koblingin eru sera løtt at handfara, eisini undir uppspiting.

Tað er MC-Sølan á Norðasta Horni í Havn sum umboðar Kawasaki motorsúkklurnar.

Fyritøkan umboðar motorsúkklumerkini Suzuki, Kawasaki og Ducati. Men vit servisera tó flest øll sløg av motorsúkklum, sigur Anders Berg, sum eigur og rekur MC-Søluna, sum leggur afturat, at sesongin fyri motorsúkklukoyring er frá apríl til oktober. Um veturin er mest at gera við eftirliti og umvæling av motorsúkklum, so tær eru klárar at taka í brúk, tá summarsesongin byrjar.

Á heimasíðuni: www.mc-solan.fo eru upplýsingar um úrvalið av t.d. motorsúkklum og skutarum og hópin av leinkjum til aðrar MC-síður.



*Kawasaki GTR 1400 er ein sonevnd Touring súkkla*



## FAKTA

| | |
|---|---|
| **Kawasaki GTR 1400 ABS** | |
| **Motorur:** | 1,4 litra 4 syl. 4-takt vatnkøldur 155 hk |
| 0-100 km/t | 2,7 sek (6-gir) |
| Toppferð | 290 km/t |
| Dekkstødd | 120/70 ZR 17 (framman) 190/50 ZR 17 (aftan) |
| **Stødd og vekt** | |
| Longd | 227,0 cm |
| Breidd | 00,0 cm |
| Hædd | 129,0 cm |
| Seturhædd | 81,5 cm |
| Vekt | 308 kg |
| Prísur | 183.900 |
| **Søluumboð** | Sp/f MC-Sølan Skemmingsgøta 23 Tel. 311101 / fax. 313763 www.mc-solan.fo |

# Opel Insignia í 2008

**Ein heilt nýggjur Opel Insignia, sum avloysir núverandi Opel Vectra, fær heimspreimieru á bilaframsýningini í London í juli 2008**

BILAR

Opel Vectra fær ein avloysara í 2008. Talan er um ein bil í miðalklassanum, sum fær navnið Insignia og verður bygdur í Týsklandi á Opel verksmiðjuni í Rüsselsheim, sum er ein av mest modernaðu í heiminum.

Insignia verður ein framkomin bilur við nýggjastu motortøknini, aktivari trygd og umhvørvisvernd. Opel Insignia kemur í staðin fyri Opel Vectra, sum avloysti Opel Ascona, sum fyrstu ferð kom á marknaðin í 1970.

Opel Insignia verður framsýndur á bilaframsýningini í London í juli 2008, og kemur eftir ætlan á evropeiska marknaðin síðst í 2008.

mg




*Enn eru ongar myndir av bilinum at finna, men her er ein mynd av bilinum aftan og av baklyktunum*